# Lønarútgjaldingarnar vaksa framvegis




*Hagtøl hjá Hagstova Føroya fyri fyrstu fimm mánaðirnar í ár vísa, at lønarútgjaldingarnar í Føroyum framvegis eru vaksandi.*

*Mynd: www.hagstova.fo*

**Hóast vit oftari og oftari hoyra um skip, sum verða løgd og um virkir, ið siga fólk úr starvi, so vaksa lønarútgjaldingarnar í Føroyum framvegis.**

HAGTØL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hetta vísa nýggjastu lønarhagtølini hjá Hagstovu Føroya, sum tó eisini vísa, at vøksturin er avmarkaður.

### Tað almenna veksur mest

Hagtølini hjá Hagstovu Føroya vísa eisini, at tað framvegis er innan almenna fyrisiting og tænastu, at vøksturin er størstur. Í mun til sama tíðarskeið í fjør vísa hagtølini fyri fyrstu fimm mánaðirnar í ár, at lønarútgjaldingarnar innan henda bólk í ár vóru 57 milliónir størri, skrivar hagstovan á heimasíðu sínari.

Tað eru tó eisini vinnubólkar, har lønarútgjaldingarnar minka munandi. Minkingin var størst innan fiski- og alivinnuna, har minkingin í áðurnevnda tíðarskeiðið var 30 milliónir krónur.

Eisini ber til at staðfesta út frá feskastu hagtølunum, at lønirnar hjá kvinnum framvegis vaksa, meðan lønarútgjaldingarnar til mannfólk standa í stað. Fyrstu fimm mánaðirnar í ár vóru lønarútgjaldingarnar til kvinnur 907 milliónir krónur, og tað eru 40 milliónir fleiri enn sama tíðarskeið í fjør. Hinvegin vóru lønarútgjaldingar til menn eina millión minni í ár enn sama tíðarskeið í fjør. Menninir forvinna tó framvegis væl meiri pening enn kvinnurnar. Í mun til tær 907 milliónirnar, ið kvinnurnar hava fingið útgoldið fyrstu fimm mánaðirnar, hava menninir fingið útgoldið 1.542 milliónir í sama tíðarskeiði.



*Meðan lønarútgjaldingarnar innan tað almenna framvegis vaksa, so verður minni goldið út innan fiski- og alivinnuna.*

*savnsmynd*

## Nýggj nevnd í KT-felagnum

Fríggjadagin í farnu viku hevði KT-felagið aðalfund. Tríggir av nevndarlimunum í gomlu nevndini stillaðu ikki uppaftur. Ein teirra var formaðurin seinastu tvey árini, Ólavur Ellefsen, meðan hinir báðir vóru Høgni Carlsen og Rolf Herup Olsen.
Í nýggju nevndina komu Ísak Jacobsen, Michael Thomsen og Eyðun E. Jacobsen. Sum tiltakslimur var Óli á Deild Olsen valdur. Eftir aðalfundin var nevndarfundur á skránni, og tá skipaði nevndin seg við Ísak Jacobsen sum formanni og Michael Thomsen sum næstformanni, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu sínari.

**tn**

## Sigldi fullur

Týskvøldið var árliga jóansøkubálið í Sandágerði, og tá plagar mangan at verða gott lag á fólki. Nýklaktar pisur, havnarfólk og fremmandir summargestir leita sær í Sandágerð, og ofta liggja bátar og damla út fyri.

Týskvøldið var lagið í so gott umborð á onkrum báti, og løgreglan valdi at kanna manningina eitt sindur nærri. Blóðroynd var tikin av manninum, sum førdi bátin, og hann verður nú skuldsettur fyri at sigla fullur.

**tn**

## Eldur í neysti

Mikudagin kom eldur í eitt gamalt neyst í Vestmanna. Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at orsøkin til eldin ivaleyst var tann, at nakrir smádreingir høvdu spælt við eld.

Vestmanna Kommuna eigur gamla neystið, sum ætlanin helst var at at ríva niður í næstum.

Sløkkiliðið í Vestmanna bleiv boðsent, og einar 20 minuttir seinni høvdu teir sløkt eldin.

**tn**

## Meiri lív í býnum

Nú allar pisurnar verða klaktar, fer meiri lív at verða í býnum. Ungdómurin, ið júst er liðugur við sína miðnámsútbúgving, vil fegin sleppa út at feira hesa hending, og tað fer eisini at seta sín serliga dám á býarlívið næstu dagarnar.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at flestøll skeinkistøð í høvuðsstaðnum í hesum sambandi hava fingið undantaksloyvi, so at tey næstu dagarnar kunnu hava longri opið enn vanligt gerandisdagar. Tí nyttar lítið hjá grannunum hjá mongu skeinkistøðunum at ringja á politistøðina at kæra sína neyð, um lív er í á skeinkistøðunum, hóast farið er um midnáttina.

**tn**